# Funnu kokain

## Løgreglan hevur ikki havt tað stóra at gera við álvarslig mál um vikuskiftið




Vit hava verið úti til húsaófrið einar 4-5 ferðir, og tað hevur verið nógv av fullum fólki. Men tað hevur kortini ikki verið nøkur ásvarslig hending, sigur vakthavandi á løgreglustovuni.

Eitt minni ferðsluóhapp var í Havn fríggjadagin, tá ein bilur koyrdi út fyri eina motorsúklu, men tíbetur hendi eingin mansskaði.

Seint fríggjakvøldið steðgaði løgreglan einum bili. Teir høvdu illgruna um rúsandi evnir, og menninir vórðu tí kropsvisiteraðir. Løgreglan fann eisini eina minni nøgd av kokaini uppi á tí eina manninum, og hann verður nú skuldsettur eftir lógini um euforiserandi evnir.

Annars fremur løgreglan eitt størri ferðsluátak kring alt landið, og um vikuskiftið hava teir verið í Suðuroynni. Hetta ferðsluátakið heldur fram alla vikuna.




**Plan B til leigu**

Leigumálið Plan B í Sverrisgøtu er til leigu.

Áhugað kunnu ringja tel. 26 48 29




**Hevur tú hund?**

So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL

**SPECIAL – 20 kg kr. 450,-**

Turrfóður til vaksnar hundar. Sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.

Bilegg beinleiðis á netinum

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com

**Sosialurin**

www.sosialurin.fo




www.autoservice.fo

**Auto Service**

Undir Krákugjógv 19 · Tel: 34 54 00 · as@autoservice.fo

Keypir tú ein nýggjan bil frá okkum, fært tú GULLPAKKAN ókeypis

NISSAN

B QASHQAI nýtsla (blandað koyring): 11,9-19,2, CO2 129-199 g/km. QASHQAI+2 nýtsla (blandað koyring): 11,9-17,5 km/l, CO2 139-208 g/km. Euro NCAP: 23.05.2007. Prísurin er uttan avhandanarkostnað uppá Kr. 2.550,-. Nýbilsgaranti 3 ár/100.000km, 3 ára lakkgaranti (ongar km avmarkingar), 12 ár ímóti gjøgnumtering. Bilurin kann vera vístur við eykaútgerð.